

www.oljan.fo

**Jan Müller** 30 - 07 - 2013

# Oljuráðharrin stuðlar Statoil

Nú er eisini norski oljumálaráðharrin, Ola Borten Moe farin uppí kjakið um ætlaninar hjá Statoil at flyta 1000 arbeiðspláss av landinum komandi árini. Hann sigur sambart NTB, at slík gongd er í tráð við ynskini hjá statinum, nakað, sum hinir flokkarnir í stjórnini eftir øllum at døma ikki eru so fegnir um. Um Statoil skal standa seg í hørðu kappingini ikki bara nú men eisini uppá longri sikt, eru vit noydd til at halda fram á somu leið sum seinastu 40 árini, og sum hevur verið sera væleydnað, nevniliga alla tíðina at kunna umleggja gongdina fyri at tryggja virðisøking og nýggj arbeiðspláss. Statoil skal vera eitt norskt felag við høvuðsskrivstovu í Norra, men tað merkir ikki, at alt skal halda fram at vera sum tað hevur verið fyrr, sigur ráðharrin við Klassekampen. Tey 1000 størvini, sum Statoil umhugsar at flyta til onnur lond við lægri kostnaði innan 2020, eru innan KT, bygging og umsiting, HR og fígging.